# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Frálíkt tiltak á Tvøroyri

Kring landið liggur hópin av gomlum mentanarvirðum, friðað hús, sum antin forfella ella standa gapandi tóm, tí eingin vil ella torir at nema við hesi fornminni. Myndugleikarnir eru strangir, og tað skulu teir vera. Hinvegin kunnu vit uttanlands t. d. í okkara grannalondum síggja, hvussu gomul friðað mentanarminni við skilagóðum arkitektoniskum loysnum og strongum fornfrøðiligum eftirliti kunnu nýtast til vinnulig ella mentanrlig endamál. Her á landi hava vit havt eina sera puritanska støðu til alt hetta økið, og ferðamaðurin fær hvørki vátt ella turt ei heldur, tá hann vitjar okkara mentanarminni. Men nú tykist vend at vera komin í, og alt fleiri fólk taka seg saman at nýta gamlar friðaðar bygningar til vinnu- og frítíðar endamál. Eitt frálíkt dømi hava vit í Klaksvík við Leikalund, og nú er Tvøroyri komið við.

Á Tvøroyri eru nøkur av elstu handilshúsunum og pakkhúsunum varðveitt. Umhvørvið við gomlu húsinum hjá Thomsen, sum einaferð vóru ogn Kongaliga Handilsins eru eitt hitt best varðveitta umhvørvið í Føroyum. Við stórum tokka og nærlagni hevur henda gamla ættin, sum upprunaliga kom úr Suðurjútlandi, røkt hetta umhvørvið. Og nú kann Suðuroyggin erpa sær av enn einari vakrari perlu. Hetta vikuskiftið vórðu nýumvældu pakkhúsini hjá Thomsens tikin alment í nýtslu. So nú kunnu mentan, lív og ungdómar aftur fylla gamla havnarlagið á hesum søguliga bletti, sum hevði sína stórheitstíð fyri mongum árum síðani sum fiska- og handilsmiðstøð landsins. Hetta er frálíkt, og hetta er eitt sera gott og djarvt hugskot. Um vikuskiftið vórðu hølini formliga tikin í nýtslu, og ein hópur av fólki høvdu leitað sær suður til vøkru oynna til móttøku. Sum altíð, sigur okkara fólk í oynni, tá ið suðuroyingar hava nakað at hátíðarhalda, var tað gjørt við pomp og pragt. Fyrst var almenn móttøku fríggjadagin, og leygardagin var stór veitsla fyri innbodnum og rimmar almennum dansur aftaná. Seglhúsloftið var karmur um alt hátíðarhaldið og stóð royndina við bravur.

Tað vil altíð vera ein sera stór og ikki heilt vandaleys uppgáva at nýta eitt so gamalt og fagurfrøðiliga einastandandi umhvørvi til vinnuligt endamál. Hinvegin hevur umhvørvið verið nýtt til vinnu síðan 1836, so hví ikki? Um øll fornfrøðilig og byggifrøðilig fyrilit eru tikin, og allar treytir hjá friðingarmyndugleikunum annars eru loknar, so kann ikki annað enn gott sigast um hetta fríska og frálíka initiativ. Stigtakarin vónar, at hetta kann gerast byrjanin til eina livandi mentanar- og ferðamannavinnu í Suðuroynni. Hon leggur dent á, at onnur noyðast eisini at bjóða seg fram við gisting og tilboðum til ferðafólk. Tað ræður um at skapa eitt heildartilboð, har øll samstarva og draga somu línu, sigur hon. Samanumtikið eiga øll at fegnast um hetta nýggja tiltak í Suðuroy, og stigtakararnir og ætt teirra eiga mikið rós uppiborið – rós fyri at hava varðveitt umhvørvið væl og virðliga og rós fyri hugflog og fyri at almenningurin nú sleppur at nýta hesar søguligu bygningar í einum óvanliga vørkum og hugnaligum umhvørvi. Vónandi verður verkætlanin øll til gangs fyri ikki bara lokalsamfelagið men fyri ein breiðan almenning og vinnulív.

**Sosialurin**

## Suðurtunnilin

ZAKARIAS WANG



Nú vit hava fingið Vesturtunnilin og Norðurtunnilin, er eftir at gera Suðurtunnilin, fyri at alt okkara land verður knýtt saman í eitt vegkervi.

At gera Suðurtunnilin er bæði tekniskt og fíggjarliga forsvarligt. Íløgan er sjálvandi størri enn til hinar báðar tunlarnar, men útreiðslur av verandi samferðsluskipan eru nógv størri enn har.

Tá hetta er gjørt, fer at bera til at flyta fólk og farm um alt landið á nátt og degi, í ódn og í logn, og fer alt samfelag okkara at fáa almiklan vinning burturúr.

Hetta verður eitt megnartak, men av tí at vit orka tað, hevði frøin um lokna verkið fingið okkum at staðið betri saman um aðrar avbjóðingar í ókomnum tíðum.

## Vilja vit liva her í Føroyum, ella bara yvirliva

GUDMUNDI LARSEN (Y)

Ja tað er tann spurningur eg loyvi meg at stilla til okkum føroyingar í hesi tíð, har tað bara verður tosað um at brúka so nógvan pening sum gjørligt, og ikki verður hugsað um, at tað í síðsta enda eru vit føroyingar, vit sum royna at gjalda okkara skatt eins og øll tey avgjøld, sum longu eru løgd á okkum aftan á síðsta stóra ballið, eitt ball sum vardi eini 10 ár, og sum at enda var við til at geva okkum teir ringastu timburmenn, sum menn vita um.

Tá eg hugsi um orðið, at liva, er tað við góðum og við ringum. Í viðgongd og mótgongd, ja ein vanligur dagur hjá okkum øllum sum búgva her í Føroyum.

At yvirliva er eitt orð sum vit flestu í hesum land hava hoyrt, men ikki hugsa um í dagligdegnum.

Tá eg hugsi um orðið, at yvirliva, leita tankarnar sum oftast út á sjógvin, har mangur sjómaður er komin at kenna meiningina júst við hesum orði, og hvat tað inniber.

Eg havi altíð hildið, at vit føroyingar sjálvandi skula gjalda fyri okkum sjálvi, ta er jú ein sjálvfylgja, men so má man eisini hugsa um inntøkur og útreiðslur, eins og hvørt vanligt húsarhald ger, hvat klára vit at vinna av pengi til okkara húsarhald, og hvat kunna vit loyva okkum at brúka.

Sum eg síggi tað í dag hongur ikki nakað saman. Tað verður tosað um milliardir út av kassanum, samstundis har fiskiflotin er í stórum trupulleikum, og har okkara einasta 100% inntøka (Blokkurin) skal burtur.

Nei eg eri bangin fyri, at tann vanligi føroyingurin skal gera seg kláran til, at koma at kenna meiningina, og ikki minst til sviðan av orðinum at yvirliva.

Eg havi onki í móti at vit gjalda fyri okkum sjálvi, sum tjóð, men so skal eisini forbrúkið hjá landskassanum verða har eftir.

Mín meining er tann, at vit sum búgva her í Føroyum ikki klára at fáa fleiri byrðar lagdar á okkara herðar, so at vit kunna gjalda fyri tað yvirforbrúk, sum landsins leiðsla hevur havt gjøgnum nógv ár.

Mín meining er tann, at vit skula liva í Føroyum, og ikki yvirliva.

## Gerhard fær fullan stuðul

**Javnaðarfólk í Sandoy taka fult undir við Gerhard Lognberg í avgjørdu støðu hansara í málinum um undirsjóvartunnilin**

Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag gevur Gerard Lognberg sín fulla stuðul í stríðnum við at fáa fast samband millum Sandoy og Meginøkið.

Tað sæst í yvirlýsing frá felagnum í morgun.

Felagið mótmælir harðliga teirri viðferð, málið hevur fingið í løgtingið og ikki minst í landstýrinum.

Teirra áheitan á politikararnar er at lata tað privata felagið hava Skalafjarðartunnilin frið.

- Gevist við at seta fólk og oyggjar uppí mótið hvørjum øðrum og Sandoy er alt ov góð og virðismikil at blíva avtoftað. Vit krevja bert tey somu rættindi sum onnur fólk í Føroyum, sigur Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag.



*Gerhard hevur javnaðarfólk í Sandoy í rygginum í avgjørdu støðu hansara í málinum um undirsjóvartunnilin*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.